UTTANRÍKISRÁÐIÐ

## Samskipari í almennum diplomati

Í Uttanríkisráðnum er starv sum samskipari í almennum diplomati (Public Diplomacy Officer) leyst at søkja. Starvið verður sett skjótast til ber.

Samskiparin hevur um hendur at skipa fyri verkætlanini um kappingarsamleika Føroya, at umsita heimasíður og vera fjølmiðlasamband Uttanríkisráðsins, at vegleiða innan alment diplomati og at fremja átøk í øðrum londum, sum betra um umdømi Føroya. Harumframt er samskiparin lutvíst ritari hjá uttanríkisráðharranum.

Vit vænta, at umsøkjarar hava miðlavísindaliga útbúgving ella samfelagsvísindaliga útbúgving á masterstigi. Í báðum førum vænta vit, at tann, ið settur verður, hevur skyn á kunning, samskifti og mentanum, hevur politiskt tev og góð samstarvsevni, er tænastuhugaður og lagaligur, er miðvísur og sjálvstøðugur, er stinnur í føroyskum og enskum máli, umframt kunnleika til onnur mál.

Starvið verður sett samsvarandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Uttanríkisráðið er í støðugari menning og tann, ið settur verður, skal tola broytingar í starvinum. Starvið verður væntandi seinni skipað í ávísari deild.

Vinaliga setið tygum í samband við Barbaru á Tjaldrafløtti á telefon +298 351010 ella +298 551040, at frætta meira um starvið. Umsóknir við prógvum og øðrum skjølum skulu sendast til Uttanríkisráðið, Tinganes, FO-100 Tórshavn ella í telduposti til info@tinganes.fo og vera frammi í seinasta lagi **mánadagin 14. apríl 2008.**

## Avloysari

til Kunningarstovuna í Vági.

Søkt verður eftir barnsburðaravloysara fyri leiðaran á Kunningarstovuni í Vági. Tørvur er á avloysara at byrja **14. apríl 2008 og til 1. juni 2009.**

Dagliga virksemi hjá kunnigarstovuni fevnir m.a. um at samskifta við útlendingar, sum koma til Føroyar og føroyingar, sum ferðast í egnum landi. Umframt tað, at veita tænastu til ferðavinnuveitarar í Suðuroy. Og annars virka fyri, at Suðuroyggin gerst so áhugaverd sum møguligt hjá ferðavinnuveitarum, íbúgvunum og teimum vitjandi.

**Vit vænta av tær:**

- at tú hevur góðan málkunnleika, at tú ert før/ur fyri at samskifta munnligt og skrivligt á skandinaviskum og enskum.
- at umsøkjarin hevur góðan teldukunnleika, tí umframt nógv av tí dagliga samskiftinum fer fram um teldu, so kemur umsøkjarin at arbeiða við fleiri heimasíðuskipanum. Møguleiki verður fyri at sleppa á skeið í viðlíkahald av heimasíðum.
- At umsøkjarin er flexibul, tí umsøkjarin kann vænta at koma at ferðast ofta í Føroyum og møguliga onkra messu/workshop uttanlanda.

Starvið er lønt í lønarflokki 2 samsvarandi sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Meira fæst at vita við at seta seg í samband við Heidi Kilgour á tlf. 374342 ella 228726

Freistin at søkja starvið er **7. apríl 2008 kl. 12.00**

**Umsóknin skal sendast til :**

**Vágs kommunu**
Vágsvegur 22
Postboks 29
FO-900 Vágur
*Viðm. Avloysari*



## KT fólk til Skipasmiðjuna

Hevur tú hug at arbeiða í einum spennandi umhvørvi, við stórum fjølbroytni, í eini tí stórstu fyritøkuni í Føroyum?

Vit leita eftir einum KT-fólki sum hevur breiðan kunnleika til teldutøkni. Arbeiðið fevnir um alt vanligt viðlíkahald av teldum, netverkið og hjálp til okkara uml. 100 KT brúkarar, umframt at vera við til at leggja okkara framtíðarætlanir innan KT økið á deildum okkara í Tórshavn, á Skála, í Runavík og í Vestmanna.

Vit roknað við at tú ert røkin, álítandi, ikki bangin fyri at taka ímóti avbjóðingum og hevur lætt við at tosa við fólk.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum, CV o.ø. skal sendast til:

Tórshavnar Skipasmiðju P/F
Postboks 65
FO-110 Tórshavn

Att: Tummas Nielsen

Umsóknarfreistin er 14. apríl 2008

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jens Hansen, KT- og trygdarleiðara á telefon 79 11 34 ella Tummas Nielsen, fíggjarleiðara á telefon 79 11 22

- ein depil innan skipatænastur

SKIPASMIÐJAN

## Aðalfundur

**Suðuroyar Norðara Bjargingarfelags verður leygardagin 29. mars kl. 19.00 í Hotel Øravík.**

Skrá sambært viðtøkum og uppskot um broytingar í viðtøkunum.

Ábit verður aftaná fundin og tí er neyðugt við tilmelding á tlf. 215570, 220528 og 213795 seinast **ónsdagin 27. mars 2008.**

*Nevndin*

## BÁTAMOTORUR TIL SØLU

Volvo Penta - kad 300 - 285 HK
*v/ vinkulgear - turbinu*

Hevur gingið 375 tímar - 21/2 til 3 ára gamal

**Vinarliga ring á tlf. 229654**

## MASKINMAÐUR

Søkt verður eftir royndum maskinmanni at bryja skjótast til ber. Talan er um virkini í Skopun og heima á Sandi

Løn sambært avtalu.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Martin Olsen, virkisleiðara á tel. 211 316

Umsóknir skulu sendast til:

**SANDOY SEAFOOD**
**240 Skopun**

## FØRARAR

**Søkt verður eftir:**

- førara at koyra lastbil
- førara at koyra trailara

***Ring 221759***

## MB NORÐHAVIÐ

søkir mann at reka línufiskiskap

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 283138

**Stuðulsbúðin fyri Danmissiónina**
**Gamalt - Nýtt fer at gevast, hjálp okkum at tøma handilin**

**GAMALT - NÝTT**